# ikki um aldur



ar royndir sum formaður í Unga Sjálvstýri. Hann hevur sínar avgjørdu meiningar, er avgjørdur og óttast ikki at ganga móti streyminum, sigur Kári P. Højgaard.

Formaðurin í Sjálvstýrisflokkinum undrast ikki á frálíku politisku úrslitini, sum Jógvan Skorheim longu hevur at vísa á.

- At hann gjørdist varaborgastjóri, varð fyrst og fremst grundað á valúrslitið, har Sjálvstýrisflokkurin fekk eina lyklastøðu. At Jógvan Skorheim megnaði at fáa fleiri tungar sessir afturat varaborgarastjórasessinum, eitt nú sum formaður í Mentanarnevndini, prógvar, at væl varð telvað. Jógvan Skorheim hevur við síni politisku ávirkan fingið ein týdningarmiklan leiklut, har hann í stóran mun kann verða við til at mynda framtíðar býráðspolitikkin í næststørsta býi føroyinga. Tað undrar meg ikki, at Jógvan Skorheim hevur nátt tindarnar í býráðspolitikki, og eg vænti, at hann fer at roynast væl sum kommunalpolitikkari og varaborgarstjóri í Klaksvík hetta valskeiði. Stórar avbjóðingar standa honum fyri framman, greiðir Kári P. Højgaard frá.

Er Jógvan Skorheim eitt nýtt stjørnuskot í føroyskum politikki?

- Tað fer tíðin at vísa. Men nógv talar fyri, at hann kann verða tað. Sum hjá fleiri løgtingslimum, vil arbeiði í kommunalpolitikki uttan iva verða lopfjølin til landspolitiska pallin. Um tú skal gera teg galdandi og verða valdur í Løgtingið, er neyðugt at prógva, hvat tú stendur fyri og hvør tú er, nú Føroyar er eitt valdømi, sigur Kári P. Højgaard, formaður í Sjálvstýrisflokkinum, og ynskir Jógvan Skorheim og býráðnum í Klaksvík góða eydnu og hepna hond restina av valskeiðnum.